Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

# Minningarorð

Innanfyri fimm ár eru fýra av mínum næstu skyldmonnum farnir inn í ævinleikan í góðum árum. Allir uttan at hava langa sjúkralegu frammanundan. Ein beiggi og tríggir svágrar. Tá ið skrivað ella sagt verður nakað um persónar, sum eru farnir av foldum, er tað rættiliga náttúrligt at nevna tað positiva við teimum. Sagt verður við hvørt, at tá eru øll góð. Um eg skal royna at hugsa um, hvat ikki var serliga gott við hesum fýra, so er einki, sum er vert at nevna. Tað verður stundum sagt, at ein minnist bert tað góða, og tað er gott, um tað er so, men eg haldi nú ikki. Eg kann við sannføring siga, at teirra lív hevur verið til gagns fyri tey, sum hava havt samband við teir á ymiskum økjum, eg sjálvur íroknaður.

Eg eri á sama aldri sum teir, og tað vísir bara, at tíðin at fara hiðani kann brátt vera komin. Er lívið stutt? Ja, tá ið ein hyggur aftur eftir, er tað sanniliga stutt. So stutt, at tað gevur meining at hugsa sær, at hetta lívið er bert ein parentes í tilveruni, sum heldur fram í ævir, men ein týdningarmikil parentes, tí tað er tað tíðarskeiðið, sum ein hevur at gera seg til reiðar til restina av tilveruni. Hvussu ger ein tað? Jú, tað er ikki nógv at gera við tað, tí tað týdningarmesta er longu gjørt, og tað, vit hava at gera, er at líta seg yvir á Hann, sum doyði fyri okkum og bar allar okkara misgerðir, so vit við at trúgva á Hann, Jesus Kristus, Guds Son, eru klár at fara inn í ævinleikan til at njóta eitt lív, sum er so nógv øðrvísi og betri, at einki menniskja er ført fyri at skilja tað.

*Tey koma ikki aftur, sum deyðin tók við sær,*
*og eingin hevur granskað og fingið nakað svar,*
*men Guds orð okkum sigur, at deyðin bara er*
*ein opin hurð, ein inngongd, til eina aðra verð.*

Er tað merkiligt, at tað er so? Tað haldi eg ikki! Her er ein ætlan aftanfyri, sum er meira enn vit kunnu ímynda okkum. Job sigur (Job 24, 7, 10-14): »Hann breiðir norðri út yvir hitt tóma og heingir jørðina á einki…. Rundan um vøtnini hevur Hann sett mark, har sum ljós og myrkur skiljast. Stólpar himmalsins riða, teir ræðast hóttan Hansara. Við veldi øsir Hann upp havið, við viti Sínum sorar Hann sundur havdrekan. Av anda Hansara verður himmalin klárur; hond Hansara gjøgnumboraði hin kvika ormin. **- Sært tú, hetta eru bert útjaðrar verk Hansara - hvat hoyra vit annað enn tesk! - Men toru veldis Hansara - hvør skilir hana!**«

Tað er stórt at vita, at vit eru partur av hesum. Ikki týdningarleysur partur, táið vit vita, hvat Guds Sonur avrikaði fyri okkara skuld!

## Marius Jóanesarson



Marius varð bert 58 ára gamal. Hann hevði ikki livað væl í seinastuni, men eingin hugsaði um, at hann var deyðanum nær, fyrrenn hann brádliga mitt undir arbeiði fekk eina bløðing í heilanum. Fáar vikur seinni doyði hann.

Eg kendi Marius frá tí, hann var blaðungur, táið hann eins og eg fór til Havnar at ganga í skúla, og vit blivu góðir við hvør sína dóttir hjá Honnu Malenu og Hans Sundstein. Marius er ein av teimum mest positivu persónum, sum eg havi kent, og sum teir beiggjarnir allir so smílandi og blíður, men Marius kanska mest. Teir hava tað helst frá mammuni, sum eg minnist sum eina sera blíða og vinarliga konu. Pápin doyði á yngri árum, so eg kendi ikki hann.

Marius fór til Keypmannahavnar at læra til politist, sum eisini bleiv hansara lívsstarv. Har komu Hanna og eg at búgva saman við honum og Elisabet eina tíð, og tessvegna komu vit at kenna hvønn annan serliga væl. Hann fekk starv í Føroyum, tað mesta av tíðini í Vestmanna. Vit fluttu eisini heimaftur, og tí komu vit at síggja nógv til hvønn annan.

Tað, sum kanska eyðkendi Marius mest umframt hansara blíða lyndi, var trúfesti, bæði móti familju, vinum og samkomu. Hetta er ein eginleiki, sum ikki sæst ov nógv til í dag, tí tíðarandin framhevjar so nógv tað, at persónliga fáa mest møguligt burturúr lívinum, sum aftur ger, at umsorgan fyri øðrum kemur í seinni røð. Marius var ikki tann, sum setti seg sjálvan fyrst. Viðurskiftini við sínar samstarvsfelagar mundi eisini vera gott, táið vit minnast jarðarferðina í Ebenezer, og stórur partur av salinum var settur við yvirvøldini í eyðkennisbúna. Tað rørdi kenslurnar. Vit halda, at hann fór alt ov tíðliga, men vit halda so mangt, sum vit einki vita um.

## Jafet Olsen



Jafet beiggja kendi eg sjálvandi allarbest. Ikki vardi meg, at hann skuldi doyggja bert 62 ára gamal. Hóast vit vóru brøður, so vuksu vit ikki upp í sama húsi tey fyrstu árini. Hann var at vera hjá Sannu fastur og Jákup Hendriki Isaksen, sum eisini búðu í Søldafirði. Tað ber ikki til at koma so nógv inn á tað her, hóast vit eiga at minnast við takksemi tað hjartalag og umsorgan, sum familjan hevði fyri okkum, táið vit vóru smá og eisini seinni, tí ráðini vegna vánaliga heilsu vóru sera ring. Av okkum sjey systkinunum vóru tað trý, sum vuksu upp hjá øðrum, og tað vóru eisini nøkur, sum løgdu hús til í áravís, so viðurskiftini við familjuna bleiv so nær, at mong av okkum systkinabørnunum gjørdu næstan ikki mun á, hvør var systkinabarn og hvør var systkin. Soleiðis kendi eg tað, og eg sigi tað til teirra rós.

Jafet var eitt lívsstykki sum smádrongur, og tað lyndið fornoktaði seg heldur ikki seinni. Tú tosaði ikki leingi við Jafet, at hann ikki kom við onkrun skemtiligum. Hann sá so væl tað stuttliga í øllum, sum vit onnur ikki løgdu merki til. Jafet var sterkur og prúður av vøkstri, so táið hann fór at spæla uppá horn seinni, so var tað sjálvandi uppá tuba, sum var líka prúð sum hann. Hana spældi hann uppá til mong høvi.

Av tí, at pápi ikki hevði heilsu til at undirhalda familjuna, lá tað fyrst og fremst á mær sum tann elsti at forsyrgja familjuna, men táið eg fór upp á skúla, tók Jafet yvir, og síðani batnaðu jú møguleikarnir fyri at forvinna pening, so byrðan varð lættari. Jafet eigur tøkk fyri hansara innsats.

Aftaná at hava siglt nøkur ár og arbeitt á Skála Skipasmiðju gjørdist hann rørleggjari, seinni á egnum virki. Vit hava notið gott av hansara kunnleika til alt slíkt. Hvussu gott var tað ikki at kunna heita á hann, táið okkurt var í ólagi, serliga hjá mær, sum hvørki dugi at halda á hamara ella tong.

Thurid og Jafet fingu reiðiliga 40 ár saman. Tey vóru serliga nær knýtt at hvørt øðrum. Tey elskaðu síni børn og barnabørn, ikki minst lítlu Turið, sum hevur so avmarkaðar møguleikar at njóta lívið.

Jafet fekk sukursjúku fyri mongum árum síðani, men livdi hampiliga væl við henni leingi, men so fóru æðrarnar til hjartað at bila, men hann fekk skurðviðgerð fyri tað. Seinnu tíðina hevði hann nógva pínu í lendunum, men fekk ikki rættiliga nakað svar uppá, hvat tað kom av. Uppundir jól í 2001 varð tað so ringt, at hann fór á sjúkrahúsið. Tollaksmessudag ætlaði hann sær heim í 40 ára føðingardag hjá Jákupi, elsta soninum, men mátti sleppa tí. Hann segði, at hann vildi samla kreftir til at koma heim jólaaftan. Men heldur ikki tað gekk. Annan jóladag bóðu læknarnir Thurid koma suður at tosa við seg. Kl. 11 fekk hon at vita, at Jafet helst ikki kom at liva meira enn ein mánaða, og at hann hevði krabbamein. Tveir tímar seinni var hann deyður. Eg var á veg suður at vitja hann, men náddi tað ikki. Mín einasti beiggi var ikki meira ímillum okkara. Orðatakið sigur: Bert er bróðurleyst bak". Soleiðis kendist tað eisini.

## Sofus M. Jacobsen



Deysboðini av Sofusi vóru tey, sum komu mest óvæntað. Hann hevur altíð havt góða heilsu og verið raskur. Hann hevði trupulleikar við fótinum eina tíð, men tað var ikki lívshættisligt. Vit vóru javnaldrar, hann var 14 dagar yngri enn eg, og 68 ára gamal, táið hann doyði.

Vit kendust nakað sum smádreingir, táið hann plægdi at koma út úr Klaksvík at vitja abba sín, sum búði niðri á Grønuskriðu, beint undir har, sum vit tá búði inni á Fløtum. Men seinni komu vit at kennast betri, tí eisini hann fekk sær eina dóttir Hans Sundstein til konu. Agnas og hann gingu bæði í skúla í Keypmannahavn. Har settu tey eisini búgv at byrja við, og har var eg mangan inni hjá teimum í Ballerup, meðan eg sjálvur gekk í skúla niðri og búði einsa-mallur, meðan Hanna og børnini vóru eftir heima. Tað var ein frístaður hjá mær at koma til.

Tey sum so mong onnur fluttu eisini heimaftur, og Sofus fekk egið ráðgevaravirki, sum hann hevði enn, men var júst liðugur at umskipað, so hann kundi vera leysur av tí, og yngru kreftirnar taka yvir, serliga synirnir báðir Árni og Bjarni.

Umframt at kennast væl sum svágrar, so høvdu vit eisini annað samband. Táið vit fóru undir at byggja trolvirki í Fuglafirði, var tað fyritøkan hjá Sofusi, sum stóð fyri prosjekteringini og eftirlitinum. Hetta var vælaverk. Seinni, í 1999, tá ið nótavirki varð bygt aftrat tí útbygda trolvirkinum, var tað aftur virkið hjá Sofusi, sum prosjekteraði. Tá var tað mest elsti sonurin Árni, sum stóð fyri tí. Hetta er framvegis eitt væl umtókt felag, sum virðing er fyri.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Sofus var góður at tosa við um ymisk evni. Hann gav tær ikki rætt, fyrrenn tú hevði grundgivið væl fyri tí, sum tú segði. Tí var hann ein góður »sparringspartnari«.

Sofus var álitismaður í so mongum, ikki minst í samkomuni í Ebenezer, har hann var ein av ábyrgdarmonnunum. Hann hevði hjarta fyri at kunngera Guds Orð, og mangan var hann saman við øðrum úti á bygd at kunngera evangeliið um Jesus.

Sofus doyði beint áðrenn jól í fjør. Hann var staddur niðri í býnum, táið hann knappliga gjørdist sjúkur, og varð straks fluttur á sjúkrahúsið, men var deyður innan tveir tímar. Ein skelkandi uppliving fyri familjuna beint undan jólum, har Sofus sjálvur var í ferð við at rigga til til jólar.

## Piddi Juul



Piddi og eg vuksu upp sum smádreingir í Søldafirði, hann eitt gott ár eldri enn eg. Í dag (7/8-04) fer hann til gravar, og eg fái ikki fylgt honum. Hann bleiv 70 ár.

Smádreingir í so lítlari bygd og so javngamlir koma at kennast væl í uppvøkstrinum, sjálvt um vit ikki vóru grannar. Eg minnist til nógvar góðar løtur, hvar vit dreingirnir spældu ymsastaðni í bygdini, men serliga var tað í fjøruni og á sandinum. Vatnið hevur nakað dragandi við sær, sum torført er at greina. Annað var at ganga á fjall og vera í fjøllunum. Millum bretsku soldátarnar - tá vórðu teir ikki kallaðir hermenn - vóru vit ofta. Teir vóru góðir við smádreingir, og vit fingu mangt plástrið uppá skurslaði knø og aðrastaðni frá Gamla Bert. Hann var vist eitt slag av lækna. Man droymir seg aftur í barnaverðina, táið man byrjar at skriva.

Vit fóru báðir til skips. Eg mest á dekkinum, men hann skjótt í maskinrúmið sum tann hegnismaður, hann var; hóast varandi brek av sjúku í barnaárunum var hann sera góður til hendurnar.

Hann sigldi í mong ár, men seinni arbeiddi hann á Vónini, og tað var mest við nótaarbeiði, sum hann jú kendi væl frá tíðini, hann sigldi við kraftblokkabátum.

1972 giftist hann við Hansu, lítlu systir míni. Tey bygdu sær hús í Søldafirði niðanfyri barndómsheimið hjá Pidda, og har hava tey búð síðani. Tey fingu tvær søtar gentur.

Eitt mugu vit systkinini takka Hansu og ikki minst Pidda fyri. Táið mamma og pápi ikki kláraðu seg einsamøll meir, tóku tey tey at búgva hjá sær, og har vórðu tey, til tey doyðu. Ikki legði eg uppá nakran máta merki til, at tað var ein belastningur fyri tey, og eg haldi, at mamma og pápi vóru sera glað fyri at vera har, og forholdið til Pidda var framúr gott. Tey fingu nógva vitjan, og pápi ofta av fremmandafólki, men bæði Piddi og Hansa tóku sera væl ímóti teimum.

Piddi var ein friðarligur og vinsælur maður.

**Olaf Olsen**

## Eyðun av Reyni í Galerie Focus




*Fríggjadagin 27. august, kl. 16 til 18, letur Eyðun av Reyni upp málningaframsýning í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn*

**Tíðindaskriv:**

Fríggjadagin 27. august, kl. 16 til 18, letur Eyðun av Reyni upp málningaframsýning í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.

Eyðun av Reyni er koloristur og dramaið í náttúruni hugtekur hann, dramaið er t.d. stormur, brim, ljós og myrkur. Málningarnir eru abstraktar temperamentfullar kompositiónir.

Framsýningin verður opin til 10. september, týsdag til fríggjadag kl. 14 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.

Jákup Reinert Hansen, prestur:

## Verja Ph.d. ritgerð sína í Århus




Í dag 26. august fer Jákup Reinert Hansen, prestur í Sandoyar sýslu, at verja Ph.d. ritgerð sína »Mellem Kor og Skib, Jakob Dahls færøske postiller« á Teologisk Fakultet í Århus.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum ið gleddu meg á 85 ára degnum 29. juni 2004.

**Blíðar heilsanir**
**Thorbjørn Hermansen, Tvøroyri**

### Dagurin

**26. august. Líradagur.** Áðrenn farið varð eftir líra, lósu teir hetta ørindi:

*Inni liggja heitir og feitir*
*tit gráu í dúni;*
*ofta munnu vit snakka*
*um tykkum heima í túni.*
*Vit eru komnir at taka,*
*men ikki at keypa,*
*ikki mugu tit undan okkum*
*í avkrók leypa.*

Dagurin verður eisini róptur líramariumessa, men tað hevur ongan kristiligan ella kirkjuligan týdning; navnið hevur dagurin fingið bara av teimum mongu mariumessunum um heystið.
26. august eitur eisini **Ireneus** til minnis um ein halgan munk úr Lyon, sum doyði umleið 258.